# Leiðari til Dagrøktina



Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 1.juni 2009 ella eftir nærri avtalu.

Dagrøktin er normerað til 70 børn í aldrinum 0 til 3 ár. 24 dagrøktarar og tveir økispedagogar starvast í dagrøktini.

**Høvuðsuppgávur:**

- Hevur fakligu og starvsfólkaligu ábyrgdina um hendi
- Fyriskipar skeið og eftirútbúgving fyri dagrøktarar
- Ger tíðarhóskandi reglur fyri skipanina, sum skulu endurskoðast við jøvnum millumbilum
- Hevur eftirlit við fíggjarætlanini og at lógir og reglur verða hildnar
- Verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarnar

**Vit vænta at tú**

- ert útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi í eini dagrøktarskipan
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sært møguleikar fram um vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við dagrøktarar og eggja teimum at menna tænastustøðið
- virkar sum »sparringspartnari« hjá starvsfólkunum
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- er køn/ur í teldu
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 22. apríl 2009.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, á telefon 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**



## [endurlýsing]

# Ergo/fysioterapeutur og heilsurøktari til eldraøkið

Í samstarvi við Nærverkið og Tórshavnar kommunu verður farið undir verkætlan at samskipa og menna tilboðini til eldri heimabúgvandi borgarar og tey, sum búgva á eldrabústovnum í Tórshavnar kommunu.

**Lýst verður eftir:**

- Ergo/fysioterapeuti við tilvísing til Tjarnargarð á lønarbrøki 1.0
- Heilsurøktara við tilvísing til Lágargarð á lønarbrøki 0,5

Endamálið við verkætlanini er at gagnnýta tilfeingið av terapeutum, sum arbeiða á røktarheimunum og skipa soleiðis fyri, er flest møgulig eldri borgararheimabúgvandi og tey, sum búgva á røktarheimi, fáa gagn av venjingartilboðunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.

Hetta verður gjørt soleiðis, at teir 6 ergo-/fysioterapeutarnir og heilsurøktari sum eru settir við høvuðsuppgávuni at venja eldri fólk arbeiða í toymi, undirvísa røktarstarvsfólk, vegleiða í nýtslu av hjálpartólum og at skjalfesta árinini av venjingini.

**Førleikar hjá ergo/fysioterapeuti:**

- Er útbúgvin ergo-ella fysioterapeutur
- Hevur royndir innan eldraøkið
- Kann tilrættisleggja og fremja venjingarætlanir
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Kann undirvísa starvsfólki innan arbeiðsrørslur
- Kann vegleiða um hjálpartól

**Førleikar hjá heilsurøktara:**

- Er útbúgvin heilsurøktari
- Hevur royndir innan eldraøkið
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi

**Vit bjóða tær:**

- Eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- At vera við til at bróta upp úr nýggjum, og soleiðis hava møguleika at seta títt persónliga fingramerki á toymið og avrik tess

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tú kemur at starvast í ergo-/fysioterapiini á Lágargarði og Tjarnargarði og heima hjá borgarunum.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita um størvini og verkætlanina við at venda sær til Marjun Poulsen, leiðandi fysioterapeutur, á telefon 31 76 88.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við neyðugum prógvi og møguligum viðmæli skal sendast til Lágargarð, Stoffalág 84, Postsmoga 1188, F0-110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 20. apríl 2009.

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan

**Tórshavnar kommuna**